# Ingeborg til reiðar at stuðla nýggjum flokki

**GOTT HUGSKOT** Forkvinnan í Føroya arbeiðarafelag heldur, at tað er tiltrongt at ein nýggjur politiskur flokkur verður stovnaður

Áki Bertholdsen

- Tað er eitt gott hugskot at fakfelagsrørslan stovnar ein nýggjan, politiskan flokk.

Tað heldur ein av máttmiklastu og kendastu fakfelagsfólkunum í landinum, Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

Hon staðfestir samstundis, at eru ávísar treytir loknar, er hon til reiðar at stuðla einum nýggjum flokki.

### Ongan góðan

Ingeborg Vinther heldur, at sum støðan er nú, eiga fakfeløgini ongan góðan í politikki, hvørki fakfeløgini á privata arbeiðsmarknaðinum ella tey á tí almenna arbeiðsmarknaðinum.

Men eftir hennara tykki eru tað ikki bara fakfelagsfólk, sum eru fyri vanbýti í dagsins politikki.

– Láglønt, pensjónistar og minni ment annars, eiga heldur ongan, sum talar teirra søk í politikki longur

– Og teir flokkarnir, sum einaferð slóu manngarð um tey minni mentu, hava gloymt alt um tey og hendan týdningarmikla part av teirra baklandi.

Í hesum sambandi hugsar hon um tær sparingar og skerjingar, sum eru framdar og sum hon sigur í mesta mun hava rakt teir veikastu bólkarnar í samfelagnum.

Tí skilir hon væl, at røddir nú eru frammi um at stovna ein nýggjan flokk.

– Tað er tiltrongt, leggur hon afturat.

### Fullur stuðul

Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag sigur at hon er til reiðar at stuðla einum nýggjum flokki av heilum hjarta.

– Lat okkum nú allarfyrst vita um nakað spyrst burtur úr, leggur hon afturat.

Men verður álvari gjørt av hesum, veldst tað sjálvandi um, hvørja stevnuskrá ein nýggjur flokkur hevur og, hvørjar hugsjónir, hann byggir á.

– treytin fyri at eg kann stuðla einum nýggjum flokki, er sjálvsagt, at eg kann taka undir við stevnuskránni og grundarlagnum annars. Men kann eg tað, eri eg eisini sinnað at stuðla av fullum huga.

Hon staðfestir samstundis, at tað er slett ikki óhugsandi, at hon hevði viljað tikið virknan lut í arbeiðnum at hjálpt einum nýggjum flokki í valstríðnum og í politiska arbeiðnum.

Men hon ger púra greitt, at sjálv er hon ikki sinnað at stilla upp.

Annars var Ingeborg Vinther sjálv í fremstu røð, tá ið Verkamannafylkingin varð stovnað og fekk umboð á tingi í 1994.

Tann royndin miseydnaðist fullkomiliga og Verkamannafylkingin fór líka skjótt í grøvina aftur, sum hon kom undan kavi.

Men Ingeborg Vinther heldur ikki, at tað eigur at ræða fakfeløgini frá at gera eina roynd afturat.

Orsøkin til at tað gekk so illa við Verkamannafylkingini var mest av persónligum orsøkum, heldur hon.

Men hon sigur, at vit læra av teimum mistøkum, vit gera.

– Fyri tað, um Verkamannafylkingin miseydnaðist, er onki í vegin fyri, at ein nýggjur fakfelagsflokkur nú kann eydnast til fulnar, sigur Ingeborg Vinther.

aki@sosialurin.fo

**» Tað eru ikki bara fakfeløg, sum hava brúk fyri einum nýggjum flokki**



**GLOYMD**

*Teir politisku flokkarnir, sum einaferð slóu manngarð um tey minni mentu, hava gloymt alt um tey og tí skilji eg væl, at røddir eru frammi um at stovna ein nýggjan politiskan flokk, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag*

## Fakfeløg umhugsa nýggjan flokk

Tað eru fimm stór fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum, sum nú stovna nýggjan flokk.

Tað eru Starvsmannafelagið, Lærarafelagið, Pedagogfelagið, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Tey hava enntá hugsað um nýtt navn og fyribils er navnið "Samstarv" best dámt.

At almennu fakfeløgini umhugsa at stovna nýggjan politiskan flokk, kemst av at eingin flokkur virðir fakfelagsrættindini, søgdu tey í fráboðan fyri nøkrum døgum síðani.

Eitt, sum tey sipa til, er, at samgongan hevur longu avgjørt, at verða lønarhækkingar fara tað at føra til uppsagnir, men tey halda eisini, at andstøðan er merkiliga tigandi í hesum máli

– Endamálið við at stovna nýggja flokk er at tryggja og styrkja vunnin fakfelagsrættindi Føroya fólki at frama, siga tey.

**Dagstovnurin Korndalsgarður**
Foravegur 11, 470 Eiði, tlf. 473588 og 210588

**Pedagogar til Barnagarðin Korndalsgarð á Eiði**

Barnagarðurin Korndalsgarður søkir eftir pedagogum, ein at byrja 1. januar 2011 og fimm at byrja 1. februar 2011. Arbeiðstíðirnar eru 20 til 32 tímar um vikuna.
Í Korndalsgarði eru fýra stovur, ein vøggustova, ein smábarnastova, ein barnagarðsstova og ein frítíðarstova. Stovnurin er vanliga opin frá kl. 7.00 til kl. 17.00.
Vit hava góðar umstøður bæði uttandura og innandura.

**Okkara ynski er at:**
- tú hevur góð samstarvsevni
- tú ert opin, erlig og fyrikomandi
- tú hevur áræði at geva børnunum avbjóðingar í gerandisdegnum
- tú vil vera við til at mynda og menna okkara pedagogiska arbeiði á stovninum
- tú kann arbeiða sjálvstøðugt, tekur ábyrgd og ert nærverandi
- tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroytttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgunum.
- tú ynskir at menna teg fakliga og verða við til at mynda stovnin
- tú hevur teldukunnleika á byrjunarstøði

**Lønarviðurskifti:**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og fylgir lønarstigunum frá 11 – 18.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving og royndum og møguliga viðmælum skulu vera Korndalsgarði, Foravegur 11, 470 Eiði, í seinasta lagi 06. desember 2010, kl. 12
Um ikki nóg nógvir pedagogar søkja, verða hjálparfólk sett í fyribilsstørv.

*Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Unn Eldevig Petersen, leiðara á tlf. 210588*